Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Jona Henriksen 80 ár:

# Stórur føðingardagur í KFUK





*Ása í Østerø og Jona saman við skótunum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sunnudagin 4. januar var opið hús Í KFUK í Havn í sambandi við at Jona Henriksen, fyrrverandi tingkvinna og KFUK-skrivari, fylti 80 ár. Nógv fólk vóru og heilsaðu uppá Jonu hendan dagin, og fleiri røður vórðu hildnar**

Tey vóru nógv sum nýttu høvið at heilsa uppá Jonu, har vóru vinfólk, familja, skótar, politikarar og onnur. Jona hevur verið við í nógvum ymiskum samanhangum og kennir so ómetaliga nógv fólk.

Tey sum hildu røðu vóru t.d. Elin Lindenskov, Sonja Klein, Óli Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Hanna Lisberg, Jóannes Eidesgaard, Bjarni Bæk, Niels Jákup Nielsen, Enok Dam, Nicolina Højgaard Joensen, Charlotta Thorsteinsson og Karin Kjølbro.

Elin Lindenskov segði m.a. at hon var ein lítil smágenta, tá hon lærdi Jonu at kenna. Hon helt ikki at hon var farin í skúla, fyrstu ferð hon var í Várgleði uppi í KFUK.

Elin mintist Jonu frá skótalívinum og sunnudagsskúlanum í KFUK. Hon segði, at Jona altíð var so smílandi og fitt og dugdi so sera væl at fortelja søgur. Søgurnar vóru líknilsir úr Bíbluni, og okkurt ævintýr eisini. Tað sum gjørdi sunnudagsskúlan so góðan, var mátin sum Jona fortaldi søgurnar uppá, hon gjørdi líknilsini so livandi, sum um tað vóru børnini sjálvi, sum søgan var um.

Hon segði víðari at Jona hevur verið virkin á so mongum pallum. Umframt at vera virkin í KFUK, so var hon ógvuliga virkin á politiska pallinum. Hon var fysta kvinna, sum var vald á ting, tað var í 1975. Longu í 1969 var hon vald sum býráðslimur í Havn.

Elin endaði røðu sína við at siga: »Jona, tú hevur verið ein av mínum fyrimyndum á so mongum økjum, takk fyri tað«.

Sonja Klein, prestur, segði m.a. at um tað hevði verið gjørd ein meiningarkanning um hvør ið var kendasta og populerasta kvinnan seinastu 50 til 60 árini, hevði Jona ivaleyst fingið fyrsta plássið.

Hon fevnir vítt og er kend og vællýdd allastaðni, tað verið seg á politiska økinum og í kristiliga felagslívinum.

Tað er ikki tí, at hon tosar fólki eftir munninum. Hon er slagferdig og sigur sína meining. Men Jona hevur nakrar heilt serligar dygdir. Tað eru tær dygdirnar, sum Paulus í Rómverjabrævinum prísar hægst hjá einum kristnum menniskja. Jona dugir at vera glað saman við teimum glaðu og gráta saman við teimum grátandi. Hetta ger hon upp á sín heilt serliga og góða máta. Og við hesum dygdum klárar hon, sum Paulus eisini vísir á, at vinna á tí ónda við tí góða. Av tí sama, kenna øll seg væl fyri, tá ið tey hava tosað við Jonu, tí hon hevur eina nátúrliga virðing fyri hvørjum menniskja, hon ger ikki mun á fólki.

Óli Jacobsen segði, at hann kom at kenna Jonu serliga væl, tá tey sótu lið um lið á tingi í 1979. Jona plagar eisini at koma inn á gólvið í Fiskimannafelagnum, eitt nú at selja lutaseðlar, har hava tey havt nógvar góðar løtur saman, og hann hevur fingið innlit í hennara bakgrund, sum er rættuliga áhugaverd. Hann helt eisini, at tey á Ellisheiminum høvdu nakað at gleða seg til, nú Jona um stutta tíð fer at koma har at búgva.





Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir o.t.



*Millum mongu gestirnar sæst Arnold K. Henriksen, beiggi Jonu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Elin Lindenskov segði, at Jona hevði verið ein av hennara fyrimyndum á so mongum økjum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Jona, Hanna Lisberg og Sonja Klein*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Jona saman við Óla Jacobsen, formanni í Føroya Fiskimannafelag. Tey hava fyrr sitið lið um lið í tinginum*

*Mynd: Jan Müller*